LM-099/2023

Annika Petersen

Fylgiskjal 32

Fra: kommunan@famjin.fo
Sendt: 21. februar 2024 21:47
Til: VMR-Journal
Emne: Hoyringssvar í samband við "Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu"

Hoyringssvar í samband við "Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu"

Fámjins kommuna kann ikki taka undir við lógaruppskotinum um burðadygga ferðavinni, í verandi líki.

Fleiri góðir tættir eru í uppskotinum, men sjálvan bulin í uppskotinum kann kommunan als ikki taka undir við.

Hatta uppskotið kemur at hava sera negativar avleiðingar fyri Fámjin, eins og onnur smápláss um landið alt.

Fámjin er markatalsbygd 24 merkur til støddar, har góð 90% eru ognarjørð.

Vit halda at nevnda uppskot kann hava negativa ávirkan á tey sum royna at reka landbúnað her í bygdini, har tey í roynd og veru missa ræðisrættin til egna privata ogn.

Fámjins kommuna vil eisini staðiliga mótmæla at landið, enn einaferð, einvegis áleggur kommunum skyldur, ið kunnu kosta nógv, uttan at landið rindar í námind av tí, ið hesar skyldur kunnu koma at kosta kommununi.

Fámjin liggur mitt í Suðuroynni, og tað viðførir heilt náttúrligt, at nógvar bygdagøtur fara umvegis kommununa. Talan er um bygdargøturnar til Vágs, Hovs/Porkeris, Ørðavíkar og til Trongisvágs. Hesar gøtur hevur Fámjins kommuna, sambært galdandi lóg, ábyrgdina av, og eru hesar í rímiligum standi til ta ferðslu, ið er á teimum. At landstýrismaðurin nú skal hava heimild at detailstýra bygdagøtunum við at seta krøv um bæði eitt og annað kann Fámjins kommuna á ongan hátt góðtaka.

Fámjins kommuna saman við markatalinum í bygdini, eru tey, sum eiga at stýra viðurskiftunum her á staðnum, bygdini og náttúruni at frama.

Vegna Fámjins kommunu,

Jóanis Lisberg, borgarstjóri.